

# Guðjónssón-stevna í Klaksvík

**Leygardagin var stór ættarstevna í Klaksvík, har eftirkomarar hjá Marino Guðjónsson**

ÆTTARSTEVNA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var at kalla um altjóða ættarstevnu, tí eftirkomarar eftir Marino eru í Føroyum, Danmark og Íslandi.

Her í Føroyum hevur Klaksvík verið karmur um uppvøkstrinum hjá størsta partinum av familjuni, og tí var tað eisini upplagt, at tað var Skálin í Klaksvík, sum var karmur um ættarstevnuna, sum nøkur í familjuni høvdu tikið stig til.

Dagurin byrjaðivið gudstænastu í Christianskirkjuni, áðrenn vitjað varð á grøvini í gamla kirkjugarðinum.

Síðani savnaðust fólkini í Skálanum, har kunning um ættina var á skránni, meðan børnini fingu loyvi at spæla í góðveðrinum. Og Skálin var so esini karmur um veitsluna, sum varð hildin leygarkvøldið.

*Tað rúgvaði væl upp, tá eftirkomarar hjá Marino Guðjónsson savnaðust í Klaksvík seinasta leygardagur*
*Mynd: Helena Kallsberg*

Frá 1. august 2009 eru ymsar broytingar á Bussleiðini í Tórshavnar kommunu.

Bussleiðin verður tó framvegis ókeypis og koyrir við sama títtleika.

Les um broytingarnar hjá bussleiðini og tak niður eina nýggja ferðaætlan á www.torshavn.fo




Tórshavnar kommuna